Fróðskaparsetur Føroya

Setursskrivstovan

## Felags leiðreglur fyri starvsfólk og lesandi fyri nýtslu av KT-skipanum á Fróðskaparsetri Føroya

**Samtyktar av setursráðnum 29.11.2005**

Hetta skriv inniheldur: Allýsingar, orðafrágreiðingar og dømi um óynsktan atburð

**Allýsingar/orðafrágreiðingar:**

Hugtakið "KT-skipanir" umfatar: arbeiðsteldur, ambætarar, netverk og annan útbúnað sum inniheldur KT.

Kjatt: Munnligt ella skrivligt samskifti millum tveir ella fleiri persónar á netverkinum. Samskiftið fer fram umvegis knappaborðið ella aðra útgerð knýtta at borðtelduni.

Ambætari: Telda ella forrit, sum gevur data ella annað tilfeingi til aðrar teldur ella forrit.

Fraspostur (Junk og Spam mail): Kann umsetast til okkurt, sum líkist burturkastpostur. Hann kann vera á pappíri, faxi ella sum teldupostur. Teldupostur er mest nýttur, tí hesin er løttur og bíligur at senda til nógv samstundis. Fraspostur er (oftast) ikki umbiðin og ikki álvarsamur teldupostur við einum tilboði um eitthvørt. At spamma merkir stutt sagt, at ein sendir óynsktan post.

Hakking: Verður sagt um virksemi, sum er samansett av, at ein persónur (teldusníkur) roynir at fáa sær atgongd til eina KT-skipan, sum hann ikki hevur lógliga atgongd til. Her er talan um revsiverd viðurskifti, og hakking hevur í summum førum verið útint sum liður í grovum brotsverki (njósning v.m.).

Niðurtøka: At taka niður (downloada) merkir at avrita data (t.d. forrit) frá einari teldu á alnetinum til egna teldu.

**Dømi um óynsktan atburð:**

Tað er millum annað ikki loyvt at:

royna at lesa, strika ella avrita teldupost hjá øðrum
falsa teldupostadressu
senda ónærislig ella hóttandi boð til aðrar brúkarar
senda frasbrøv, ketubrøv ella líknandi
fáa sær ella halda fast um brúkaranavn (user-id) undir følskum fortreytum
lána út ella deila brúkaranavn/loyniorð við onnur. Um hetta hendir, verður eigarin persónliga ábyrgdaður fyri allar gerðir hjá lánaranum
strika, hyggja at, avrita ella broyta data hjá øðrum, uttan at hava fingið loyvi áðrenn
royna at snýta við tillutaðum tilfeingi, rættindum v.m.

Postrúm 272 FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14 FO 100 Tórshavn | Heimasíða www.setur.fo | Teldupostur setur@setur.fo | Telefon: 35 25 00 | Faks: 35 25 01

brúka netverkið og/ella skipanir knýttar at tí til at fáa heimildarleysa atgongd til annað atknýtt tilfeingi
royna at dekryptera skipanar- ella brúkaraloyniorð
royna at avrita skipanarfílur, sum vanliga ikki eru atgeingiligar
royna at hakka trygdarskipanina
innleggja teldu-virus ella onnur forrit, sum kunnu avbróta ella oyðileggja raksturin av bæði innanhýsis og uttanhýsis skipanum
ávirka trúnaðin av data
upprætta uppringda atgongd til KT-skipanir gjøgnum telefonnetið ella tilsvarandi skipanir, uttan at hava fingið loyvi frammanundan frá KT-trygdarábyrgdaranum á Setrinum
avrita triðjapartstilfar uttan heimild frá eigara ella uttan lógligan lisens
býta út ólóglig forrit, filmar, tónleik v.m.
halda fram við ótálmaðari nýtslu av kervistilfeingi, sum eru øðrum lógligum brúkarum til ampa aftaná at vera gjørd/ur varug/ur við hetta
royna at steðga KT-skipanum ella oyðileggja teirra virki
skanna netverk fyri adressur, portur, tænastur v.m.
taka niður og/ella senda víðari ljóð- og myndafílur, uttan so at hetta hevur tilknýti til undirvísing, gransking og/ella fyrisiting.